UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FOREIGN AFFAIRS AND TRADE

# Uttanríkispolitisk frágreiðing

Frágreiðing til aðalorðaskiftis sambært § 51, stk. 4 í tingskipanini

Løgtingsmál nr

# Innihaldsyvirlit


1. Inngangur ..... 4

2. Løgfrøðiliga grundarlagið ..... 5

*2.1 DFG-leisturin ..... 6*

3. Trygdarviðurskifti ..... 6

4. Arktis og Útnorður ..... 7

*5.* Handil við umheimin ..... 8

*5.1 Broytt útflutningsmynstur ..... 9*

*5.2 Marknaðarføring av føroyskum vinnulívi í útheiminum ..... 10*

*5.3 Fríhandilssáttmálar og arbeiðið fyri betri handilssømdum ..... 10*

Turkaland ..... 11

EABS ..... 11

Kina ..... 11

Japan ..... 12

USA ..... 13

Onnur lond ..... 13

6. Evropa ..... 13

*6.1 Brexit ..... 14*

*6.2 Styrkt samstarv við ES ..... 15*

*6.3 EFTA ..... 17*

*6.4 Hoyvíkssáttmálin ..... 18*

Lógin um sjófeingi ..... 18

Framtíðin ..... 18

7. Menningarsamstarv og neyðhjálp ..... 19

*7.1 Menningarsamstarv ..... 19*

*7.2 Neyðhjálp ..... 20*

8. Norðurlandamál ..... 20

*8.1 Føroyskur limaskapur ..... 21*

*8.2 Danskur formansskapur ..... 21*

9. Ímyndin av Føroyum úti í heimi ..... 21

*9.1 FaroeIslands.fo ..... 22*

*9.2 Whaling.fo ..... 22*

*9.3 FaroeseSeafood.com* ... *23*

10. Veiðufelagsskapir ... 23

*10.1 NEAFC* ... *23*

*10.2 NAFO* ... *24*

*10.3 NASCO* ... *24*

*10.4 SPRFMO* ... *24*

*10.5 NAMMCO* ... *25*

11. Atlimaskapur í ST-felagsskapum ... 25

*11.1 FAO* ... *25*

*11.2 IMO* ... *25*

*11.3 UNESCO* ... *26*

# 1. Inngangur

Heimsins lond eru vorðin støðugt nærri knýtt at hvørjum øðrum, fyrst og fremst búskaparliga, men eisini politiskt og mentanarliga. Altjóða samansjóðingin er drivin fram av tættari samhandilsnetverkum og tøkniligari menning, har ið vørur, tænastur, peningur, boðskapir og fólk eru meiri landafrøðiliga óbundin og flytfør enn nakrantíð áður. Møguleikar eru í hesi altjóðagerð, eins og trupulleikar og avbjóðingar. Meira framkomið eitt land er, meira er tað knýtt at øllum hesum millumlanda viðurskiftum og samansjóðing. Føroyar eru eitt av teim framkomnu londunum, sum hava nógv at vinna við at røkja týdningarmikil áhugamál á altjóða leikpallinum.

Føroyskur uttanríkispolitikkur er ein staðfesting av, at Føroyar eru partur av altjóða samfelagnum. Sostatt snýr uttanríkispolitikkur seg ikki einans um at tryggja Føroyum atgongd, vinning og rættindi, men eisini um at taka ábyrgd og lyfta í felag saman við heimsins tjóðum. Tí er umráðandi at Føroyar taka virknan lut í millumtjóða og altjóða samstørvum. Føroyar eru virknar í menningarsamstarvi og neyðhjálp, við til at tryggja burðardygga fyrisiting av tilfeingi í havinum og at minka um útlát av vakstrarhúsgassum, raðfesta mannarættindi og støðugt virka fyri frælsum handilstreytum, sum eru við til at tryggja vøkstur og framburð.

Uttanríkispolitikkur er ein grundleggjandi partur av virkseminum í øllum londum. Søguliga hevur talan serliga verið um trygdar- og verjupolitikk, seinni eisini handilspolitikk, men síðan seinna heimsbardaga eru altjóða og millumtjóða samstørv vorðin alsamt meira týðandi og umfatandi. Sáttmálar, samstørv og felagsskapir regluseta, samskipa og samansjóða samstarv millum lond á mongum økjum. Tískil eru nógv heimlig málsøki knýtt at uttanríkispolitikki, og altjóða samstarv – og tað sum fyriferst uttanfyri landoddarnar – er soleiðis mangan ein fortreyt fyri vælferð og menning í Føroyum.

Í samsvari við at samstarv í altjóða samfelagnum hevur tikið dik á seg og hevur ment seg til at fevna um fleiri og fleiri øki, eru altjóða samstørv og uttanríkispolitikkur yvirhøvur vorðin alsamt meira umráðandi at taka lut í. Fyri Føroyar hava uttanríkispolitikkur og altjóða luttøka stóran týdning, tí einki kemur av sær sjálvum í altjóða politikki, har ið lond sjálv vinna sær rásarúm. Tí eru felagsskapir og samstørv við onnur lond pallar, har Føroyar kunnu gera vart við seg og gera sína ávirkan galdandi.

Sostatt ber til at siga, at landsins politikkur hevur ein úteftirrættaðan arm, uttanríkispolitikkin, og ein inneftirvendan arm, innanlandspolitikkin, sum eru tvær síður av somu søk; bæði skulu orðast og útinnast fyri at røkja áhugamál landsins og fólksins á besta hátt. Hetta verður serliga gjørt við í millumtjóða viðurskiftum at halda fram at menna vinnuligu samstarvsmøguleikarnar, til tess at skapa støðugt betri liviumstøður fyri landsins fólk.

Føroyar eru eitt land í heiminum, ið noyðist at fyrihalda seg til tey mongu mál og tær stóru avbjóðingar, sum tað sømir seg eini framkomnari og ábyrgdarfullari tjóð. Og serstakliga er neyðugt at halda fram at menna landsins uttanríkispolitikk og úteftirvenda virksemi og átøk til tess at vinna landinum ágóðar og fyrimunir í tí altjóða umhvørvi, sum okkara land, vinna og borgarar eru partur av og virka í.

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum varðar av uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikki Føroya við teimum avmarkingum, sum ríkisrættarliga støðan hevur við sær. Harumframt umsita onnur stjórnarráð arbeiðsøki og sáttmálar, sum hava við millumtjóða viðurskifti at gera. Sáttmálar um eitt nú skattlig viðurskifti eru hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum varðar av sínámillum samráðingum og strandarlandasamráðingum um fiskirættindi.

Henda frágreiðing lýsir í høvuðsheitum tær uppgávur sum liggja hjá landsstýrismanninum í uttanríkismálum. Frágreiðingin lýsir tó ikki øll økini, men varpar ljós á nøkur av teimum mest aktuellu og týdningarmestu økjunum.

Umframt uttanríkispolitisku uppgávurnar, ið liggja beinleiðis hjá landsstýrismanninum, hevur landsstýrismaðurin ábyrgd av tryggja neyðugu samskipanina av føroyskum uttanríkispolitiskum áhugamálum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur dagligu fyrisitingina av nevndu uppgávum landsstýrismansins um hendi. Uttanríkistænastan hevur saman við teimum fimm sendistovunum, ið bygnaðarliga eru partur av uttanríkistænastuni, yvirskipaðu uppgávuna at røkja áhugamál Føroya úti í heimi.

Endamálið við at reka føroyskan uttanríkispolitikk er fleirtáttað. Tað snýr seg bæði um at vekja ans fyri, røkja og menna føroysk áhugamál úti í heimi mótvegis øðrum londum, felagsskapum og samstørvum. Seinastu árini hevur leikluturin hjá Føroyum á uttanríkispolitiska økinum verið støðugt virknari, og er tað til frama fyri føroysk áhugamál, at føroyskir myndugleikar átaka sær alt størri ábyrgd á uttanríkispolitiska pallinum.

## 2. Løgfrøðiliga grundarlagið

Føroysk luttøka í altjóða samfelagnum er løgfrøðiliga grundað á tvær semjur millum landsstýrið og donsku stjórnina, heimastýrislógina frá 1948 og á uttanríkispolitisku lógina frá 2005, umframt siðvenju á økinum.

Uttanríkispolitiska virkisføri Føroya er tengt at, hvørt avvarðandi málsøki er yvirtikið ella ikki. Tá ið talan er um yvirtikin málsøki, skipar uttanríkispolitiska lógin frá 2005, saman við siðvenju á økinum, karmarnar fyri luttøku Føroya í altjóða samfelagnum. Dømi um beinleiðis millumtjóðasamráðingar eru bilateralar handilssamráðingar og millumtjóða fiskivinnusamstarv. Harafturímóti, tá ið talan er um øki sum ikki eru yvirtikin, men sum hava týdning fyri Føroyar, skal landsstýrið í samsvari við Fámjinsskjalið takast uppá ráð, við tí fyri eyga at hava veruliga samávirkan.

Sambært uttanríkispolitisku lógini frá 2005 kann landsstýrið samráðast og gera sáttmálar við onnur lond og felagsskapir, tá ið hesir sáttmálar burturav viðvíkja málum, ið hoyra undir málsræðið hjá føroyskum myndugleikum. Tá ið Føroyar gera altjóðarættarligar sáttmálar eftir hesi lóg, bera Føroyar vanliga heitið “Danmarkar kongsríki, Føroyum viðvíkjandi.”

Fyritreytin er, at hesir sáttmálar ikki viðvíkja Grønlandi, og at teir heldur ikki skulu galda fyri Danmark ella verða gjørdir við millumtjóða felagsskap, sum Danmarkar kongsríki er partur av. Føroyar kunnu tó sambært § 4 í uttanríkispolitisku lógini frá 2005 gerast partur av millumtjóða felagsskapum í egnum navni, treytað av at tað er sambærligt við reglurnar hjá felagsskapinum sjálvum og við stjórnarskipanarligu støðu Føroya.

Uttan mun til ásetingarnar í uttanríkispolitisku lógini virka Føroyar sambært drúgvari siðvenju sum sjálvstøðugur sáttmálapartur á fleiri millumtjóða samstarvsøkjum. Eitt nú eru Føroyar sjálvstøðugur partur í sáttmálum, sum viðvíkja felags umsiting av ferðandi fiskastovnum.

### *2.1 DFG-leisturin*

Uttanríkispolitiska lógin hevur eina óhepna avmarking, tá ið talan er um altjóðarættarligar sáttmálar á yvirtiknum málsøkjum, ið viðvíkja bæði Føroyum og Grønlandi. Tá ber ikki til hjá landsstýrinum einsamøllum at samráðast, men skal landsstýrið samráðast saman við Grønlandi, undir navninum *"Danmarkar kongsríki, Føroyum og Grønlandi viðvíkjandi,"* stytt DFG. Treytin er, at talan er um sáttmálar ella felagsskapir, har Danmark sum so ikki er sáttmálapartur.

Dømi um hetta eru NEAFC, NAFO og NASCO, sum eru felagsskapir um fiskiveiðusamstarv í altjóða sjógvi, har Danmark er umboðað í sáttmálanum gjøgnum ES. Í hesum felagsskapunum eru Føroyar og Grønland við í felag undir heitinum DFG. Í SPRFMO luttaka Føroyar tó einsamallar undir heitinum "*Danmarkar kongsríki, Føroyum viðvíkjandi.*"

Sum limaland hevur DFG eina atkvøðu eins og hini limalondini í felagsskapunum. Føroyar og Grønland skulu sostatt vera samd um, hvussu farast skal fram, tá atkvøðast skal, t.d. um hvussu fiskiskapur eftir ávísum fiskaslagi skal skipast.

Føroyar og Grønland hava í samstarvinum lagt seg eftir, at um bara annað landið hevur ítøkilig áhugamál í einum fiskiskapi, verður tað hetta landið, sum ger av, hvussu atkvøðast skal. Eru áhugamálini ikki tey somu í einum máli, atkvøður DFG ikki. Hesin atkvøðuleistur hevur við sær, at Føroyar og Grønland verða sett uttan fyri ávirkan, tá ið londini hava ymisk áhugamál. Hetta er óheppið, og kann gera tað torført at gera strategiskar semjur við lond, sum vit hava felags áhugamál við, og síðani tryggja, at hesar semjur verða samtyktar í NEAFC. Eitt dømi er makrelsemjan, sum Føroyar gjørdu við Noreg og ES, men sum vit (DFG) ikki kundu taka undir við í NEAFC.

Landsstýrið setti sær tí fyri í samgonguskjalinum, at uttanríkispolitiska lógin skuldi endurskoðast við tí endamáli at taka burtur nevndu avmarkingar og forðingar.

Eftir avtalu við donsku stjórnina varð settur ein felags føroyskur-danskur embætisbólkur at arbeiða við málinum. Tíverri eru ikki útlit til at nevniverd framstig fara at koma burturúr hesum arbeiði. Hóast arbeiðsbólkurin hevur havt eina røð av fundum, verður frá danskari síðu tvíhildið um, at við uttanríkispolitisku lógini frá 2005 hava føroyskir myndugleikar fingið so víðar heimildir á uttanríkisøkinum, sum tað yvirhøvur ber til at fáa innanfyri grundlógarinnar karmar. Sambært fatanini hjá donsku stjórnini er danska ríkið eitt eindarríki, og eindarríkisfatanin forðar sambært donsku stjórnini fyri, at Føroyar kunnu gera sáttmálar í egnum navni, og vera sjálvstøðugur partur av sáttmála, sum Danmark eisini er partur av. Eitt og sama ríki kann ikki hava dupultan, tíansheldur trídupultan limaskap í sama felagsskapi, ella luttaka sum ymiskir partar í sama millumtjóða sáttmála. Fatanin forðar fyri, at Føroyar og Grønland kunnu røkja uttanríkispolitisk áhugamál leys av hvørjum øðrum, tá tað kemur til at gera fólkarættarligar sáttmálar, ið eru viðkomandi fyri bæði londini. Hetta forðar eisini fyri, at Føroyar og Grønland kunnu hava hvør sín limaskap í millumtjóða felagsskapum, sum. t.d. NEAFC.

# 3. Trygdarviðurskifti

Hóast trygdar- og verjupolitikkur eru felagsmál, sum formliga liggja hjá ríkismyndugleikunum í Keypmannahavn, so er tað landsstýrið, ið stendur til svars fyri at verja trygdina hjá Føroya fólki og hevur sostatt medábyrgd at syrgja fyri, at trygdaráhugamál á øllum økjum eru vard og røkt.

Í 2004 samtykti Løgtingið, at landsstýrið skuldi verða kunnað um trygdarpolitisk og verjumálslig viðurskifti, sum viðvíkja Føroyum, og at landsstýrið skuldi hava ávirkan á tílík mál. Í 2005 varð Fámjinsskjalið undirskrivað. Endamálið við tí er at tryggja føroyskum myndugleikum veruliga ávirkan á felagsmál, millum annað verju- og trygdarpolitikk. Fámjinsskjalið staðfestir, at danska stjórnin skal taka landsstýrið við uppá ráð í málum, sum viðvíkja Føroyum ella týðandi føroyskum áhugamálum.

Eftir at kalda kríggi endaði, broyttust trygdarviðurskiftini millum eystur og vestur grundleggjandi. Hugmyndaliga stríðið, ið, saman við eini tvípólaðari valdsjavnvág, var orsøkin til drúgva spenningsstríðið við USA og Sovjetsamveldinum sum mótpólum, endaði. Føroyar vóru partur av strategisku tilvitskuni hjá báðum pørtum undir kalda krígnum. Tá kalda kríggið endaði, gjørdust millum annað Miðeystur, Afganistan, stríðið ímóti yvirgangi og seinni spurningurin um nettrygd brennideplar á trygdar- og hernaðarpolitiska heimspallinum.

Í nøkur ár hevur spenningurin nú aftur verið vaksandi millum eystur og vestur. Hernaðarliga virksemið um okkara leiðir er økt og fleiri av heimsins stórveldum sýna Arktis og Norðurhøvum alsamt størri áhuga. Í hesum samanhangi kann strategiska støða Føroya í miðjum Norðuratlantshavi vera áhugaverd.

Vísandi til bæði Løgtingssamtyktina frá 2004 og til Fámjinsskjalið hevur landsstýrið í fleiri førum mótvegis donsku stjórnini víst á, at tørvur er á betri kunning um trygdarpolitisk og verjupolitisk mál. Eitt úrslit av hesum er, at arbeitt nú verður við at leggja lunnar undir mannagongdir, sum kunnu tryggja, at føroyskir myndugleikar verða kunnaðir og í størri mun verða tiknir við uppá ráð í trygdar- og verjupolitiskum spurningum, sum eru viðkomandi fyri Føroyar.

Eisini eru Føroyar umboðaðar í arbeiðinum, sum fer fram í sambandi við at kanna útlendskar íløgur fyri duld strategisk endamál hjá fremmandum londum. Talan er serliga um møguligar íløgur í týðandi undirstøðukervi – bæði talgilt og fysiskt.

Tað er ein sannroynd, at talgilding ber í sær møguleikar fyri nýggjum hóttanum og eisini álopum. Nettrygd er tí sett á breddan og í hesum sambandi hevur samskifti verið millum danskar og føroyskar myndugleikar um at samskipa nettrygdina í Føroyum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Fíggjarmálaráðið, sum formliga varðar av nettrygd í málsøkjabýtinum, Fjarskiftiseftirlitið, Gjaldstovan, Løgreglan og Føroya Tele eru partur av hesum arbeiði.

## 4. Arktis og Útnorður

Arktiska økið, og harvið eisini Útnorður, eru vorðin ein miðdepil í einum nýggjum geopolitiskum veruleika. Við veðurlagsbroytingunum og bráðnandi ísinum í Arktis, fær økið alsamt vaksandi búskaparligan og geopolitiskan týdning, og tað merkist, at heimssamfelagið í størri og størri mun vendir eyguni norðureftir.

Broytta geopolitiska støðan setur krøv til londini í útnorði. Londini skulu vera tilvitað um, hvønn leiklut tey hava saman og hvør sær, og ikki minst vera tilvitað um týdningin av góðum og tøttum samstarvi. Sum karmur um økissamstarv eru Arktiska Ráðið og Útnorðurráðið týdningarmeiri enn nakrantíð.

Arktiska Ráðið er eitt millumtjóðasamstarv um arktisk viðurskifti. Limalondini eru Kanada, Kongsríki Danmarkar (sum fevnir um Danmark og Føroyar og Grønland), Finnland, Ísland, Noreg, Svørki, Russland og USA. Flestu evnini, ið verða viðgjørd í Arktiska Ráðnum, eru eisini málsøki, sum Føroyar hava ræði á. Tí er tað umráðandi at tryggja, at Føroyar eru við til at orða og menna avgerðirnar, sum verða tiknar í Arktiska Ráðnum, so tær eru hóskandi fyri

føroysk viðurskifti. Virksemið í Arktiska Ráðnum hevur fyrst og fremst snúð seg um at gera frágreiðingar, støðulýsingar, tilmæli og leiðreglur um viðurskifti á arktiska økinum. Harafturat hava londini samtykt tríggjar bindandi millumtjóðasáttmálar innan fyri karmarnar av Arktiska Ráðnum. Teir fevna ávikavist um leiting og bjarging, tilbúgving í sambandi við oljudálking, og samstarv innan arktiska gransking.

Føroyar taka virknan lut í økisbundnum millumtjóðasamstarvi við serligum denti á náttúrutilfeingi, burðardygga vinnumenning, gransking og mentan. Sum fiskivinnutjóð hava Føroyar ein týðandi leiklut í Arktiska Ráðnum eins og í øðrum millumtjóðasamstarvi. Fyrst og fremst snýr tað seg um at virka fyri rættindum at gagnnýta havtilfeingið burðardygt, at verja umhvørvið og at tryggja ein sjálvberandi búskap.

Føroyskir serfrøðingar hava luttikið í arbeiðsbólkum undir Arktiska Ráðnum heilt frá byrjan, og talan er um virðismikil samstørv, ið eru viðkomandi fyri Føroyar. Frá at vera eitt samstarv, ið upprunaliga varð grundað á umhvørvisvernd, verður sjóneykan alsamt meir sett á fólkið, ið býr í arktiska økinum og teirra livikor, t.v.s. burðardygg búskaparlig menning av samfeløgunum í Arktis.

Føroyar hava nógv í felag við hini samfeløgini í Arktis, serliga hvat viðvíkur búskapargrundarlagi, nærleika við náttúruna, mentan og avbjóðingar í sambandi við at tryggja fólkavøkstur og burðardygga menning. Hetta vóru eisini høvuðsevnini á arktisku ráðstevnuni, Arctic Hubs, sum landsstýrið saman við Arctic Circle skrivstovuni skipaði fyri í Norðurlandahúsinum í mai 2018, har luttakarar úr øllum heiminum vóru við.

Útnorðurráðið er tingmannasamstarv millum Ísland, Grønland og Føroyar, og hevur fleiri áratíggju á baki. Øll árini hevur samstarvið havt ein týðandi leiklut í at knýta londini saman og plikta til støðugt at økja sínámillum samstarvið á ymsum økjum. Tað var eitt frambrot, tá Útnorðurráðið í 2017 fekk eygleiðarastøðu í Arktiska Ráðnum, tí hetta hevur stóran týdning í mun til at styrkja vitanina um møguleikar og avbjóðingar í føroyskum øki og kann gera okkum betur før fyri at røkja føroysk áhugamál.

Útnorðurráðið hevur í mong ár víst á týdningin at styrkja samstarvið á stjórnarstigi og at londini gera felags ætlanir innan m.a. flutning, ferðslu og fríhandil. Úrslitið av hesum tilráðingum var, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum í 2016 tók stig til at orða eina samstarvsavtalu millum tey trý londini í Útnorði. Útnorðuravtalan varð undirritað í 2017 og endamálið er at styrkja sambandið og samstarvið millum londini í Útnorðri, serliga við atliti at handli. Eisini binda uttanríkisráðharrarnir seg til at hittast árliga at tosa um felags mál og at virka fyri at loysa møguligar forðingar. Síðan 2017 hevur tað verið fastur táttur, at uttanríkisráðharrarnir hittast á ársfundinum hjá Útnorðurráðnum, har teir hava bæði tvíliðaðar fundir umframt ein toppfund millum ráðharrarnar frá øllum trimum londunum.

## 5. Handil við umheimin

Føroyar eru ein fríhandilstjóð. Grundarlagið undir búskaparvøkstri og harvið vælferð í Føroyum er, at samhandilin millum Føroyar og umheimin er so opin, víðfevndur og støðugur sum til ber.

Arbeitt verður tí miðvíst fyri at betra um møguleikarnar hjá føroyskum vinnulívi at innflyta og útflyta vørur við at virka fyri fríhandilssáttmálum við tey lond, sum føroyskt vinnulív sær møguleikar í.

Yvirskipað eru trý sløg av handilsforðingum, ið arbeitt verður fyri at beina burtur: tollur, kvotur og teknisk krøv. Lond hava handilsforðingar fyri fyrst og fremst at verja sín egna marknað, men tað ikki eitt ókent fyribrigdi, at lond eisini nýta handilsforðingar sum politiskt amboð, t.d. við at seta í verk revsitiltøk og revsitoll. Harumframt áseta flestu lond heilsufrøðilig krøv í sambandi við innflutning av matvørum fyri at tryggja sínum borgarum heilsugóðar vørur.

Ein stórur partur av teimum vørum, sum verða framleiddar í Føroyum, verður framleiddur við útflutningi fyri eyga og ein stórur partur av teimum vørum, føroyingar brúka, verður innfluttur. Tí eru Føroyar knýttar at marknaðum í øðrum londum í størri mun enn lond við størri heimamarknaði. Samhandil við umheimin er tískil ein snúningsásur í føroyska búskapinum og ein fortreyt fyri vøkstri og menning í Føroyum.

Føroyar eru hvørki partur av ES, EFTA og heldur ikki av øðrum felagskapum, sum samráðast um handilsssáttmálar í felag. Tí er ein týdningarmikil uppgáva hjá landsstýrininum at tryggja føroyskum vinnulívi kappingarføra marknaðaratgongd. Nógv orka verður løgd í hetta arbeiðið og seinnu árini hevur miðvíst verið arbeitt við at vinna Føroyum betri handilssømdir í m.a. Kina, Japan og Eurasiatiska Búskaparsamveldinum. Ásannast má í tí sambandi, at tað ofta er ein avbjóðing at sannføra onnur lond um, at tað er ein fyrimunur fyri báðar partar at menna formligu handilsviðurskiftini landanna millum. Orsøkin er eyðvitað, at føroyski marknaðurin er lítil í vavi, og tí krevjast mangan góðar grundgevingar hjá eini fremmandari stjórn fyri at raðfesta arbeiðsorku til at skipa handilsviðurskiftini við Føroyar formliga.

Ríkisrættarligu viðurskiftini – tað at Føroyar ikki eru eitt sjálvstøðugt ríki – er ein onnur avbjóðing í hesum sambandi, tí serliga lond, ið hava sjálvstøðugar ríkispartar, eru varin at gera fríhandilssáttmálar við lond, sum ikki eru fullveldisríki.

## *5.1 Broytt útflutningsmynstur*

Útflutningsmynstrið hjá Føroyum er nógv broytt seinastu umleið tíggju árini. Økt uppsjóvartilfeingi og stórur vøkstur í alivinnuni hava verið viðvirkandi til, at síðan 2009 er virðið á útfluttum vørum nærum tvífaldað – úr 4,1 milliard í 2009 í 8 milliardir í 2018. ES er framvegis størsti einstaki marknaðurin fyri føroyskar útflutningsvørur. Í virði er útflutningurin til ES vaksin nakað seinastu 10 árini, men lutfalsligi marknaðarluturin hjá ES er kortini minkaður munandi. Hetta kemst av, at føroyskar fyritøkur hava økt um søluna til aðrar marknaðir – serliga Russland, men eisini Kina og USA. Útflutningurin til Russlands er fleirfaldaður – úr umleið 650 mió. upp í 3,2 mia. eftir 10 árum. Orsøkin er millum annað, at Føroyar síðan 2014 hava havt serstøðu á russiska marknaðinum, tí Føroyar ikki eru fevndar av forboðnum, sum russiska stjórnin hevur sett fyri at m.a. ES, Noreg, Ísland, USA og Kanada kunnu selja Russlandi matvørur.

Russland er sostatt tað landið, sum innflytir mest úr Føroyum. Bretland er tað einstaka land í ES, sum keypir flestar føroyskar vørur, tilsamans sløk 10 prosent av samlaða útflutninginum. Afturat teimum eru millum fimm teir størstu innflytararnar av føroyskum vørum Danmark, USA og Kina. Hetta er ein grundleggjandi broyting í samhandlinum hjá Føroyum samanborið við fyri bara 10-15 árum síðan, tá at kalla allur útflutningurin fór til ES. Tá var handilssáttmálin við ES karmur um bróðurpartin av útflutninginum, men broytta útflutningsmynstrið krevur, at landsstýrið leggur nógva orku í at virka fyri fleiri fríhandilssáttmálum við nýggjar marknaðir, ið veita føroyskum vørum so góða marknaðaratgongd sum gjørligt.

Samlaði vøruinnflutningurin í fjør var 7,7 milliardir krónur. Sum heild ber til at siga, at innflutningsmynstrið hevur verið meira støðugt enn útflutningsmynstyrið, ið er broytt grundleggjandi. Danmark er tað landið, Føroyar innflyta mest úr; í 2018 var samlaða virði 2,8 milliadir, svarandi til góð 36 prosent. Sostatt stendur handilsjavnin við Danmark í 2 milliardum í halli. Annars eru Týskland, Kina, Noreg, Svøríki, Ísland og Bretland millum londini, Føroyar innflyta mest úr. Í samhandlinum við flestu lond hava Føroyar munin á handilsjavnanum.

## 5.2 Marknaðarføring av føroyskum vinnulívi í útheiminum

Ein liður í arbeiðinum hjá landsstýrinum at útvega Føroyum betri handilssømdir og fáa í lag fríhandilssáttmálar, er at rudda slóð, so føroyskar fyritøkur hava møguleika at fáa fótin fastan á nýggjum marknaðum. Ein serstøk játtan hevur í hesum samgonguskeiðinum verið á fíggjarlógini til marknaðarføring av føroyskum vinnulívi úti í heimi.

Í samstarvi við vinnuna hava fleiri vinnu- og handilsferðir verið fyriskipaðar seinnu árini, millum annað í Íslandi, Kina, Turkalandi og Russlandi. Eisini hava átøk saman við vinnuni verið í Armenia, í Brússel, í Moskva, í Keypmannahavn og í London. Landsstýrismaðurin hevur staðið á odda fyri fleiri av hesum vinnuferðum. Ferðirnar og átøkini hava fevnt breitt til tess at tryggja fjølbroytni í luttøkuni í mun til vinnugreinar.

Undirtøkan fyri handilsátøkunum hevur verið góð. Talan hevur verið um luttøku frá bæði stórum fyritøkum, ið standa seg væl á altjóða marknaðinum, og smærri fyritøkum, ið ikki hava royndir uttanfyri Føroyar. At somu fyritøkur hava verið við á fleiri ferðum, verður sæð sum ein ábending um, at vinnan fær gagn av at taka lut í handils- og vinnuferðum uttanlands. Afturmeldingarnar hava sum heild verið jaligar og dømi eru um, at ítøkilig úrslit, sum til dømis bíleggingar, sølur og samstørv, fleiri ferðir eru spurd burturúr vinnuferðum og handilsátøkum.

Í handilshøpi verður dentur lagdur á gott samstarv við føroyskt vinnulív soleiðis, at ynskir og tørvir hjá vinnulívinum verða havd í huga og umboðað, tá handilspolitiskir spurningar verða viðgjørdir. Uttanríkis- og vinnumálaráðið samskiftir regluliga við Vinnuhúsið og við einstakar fyritøkur, ið koma við fyrispurningum. Eisini virka bæði sendistovurnar og Uttanríkis- og vinnumálaráðið javnan sum bindilið, tá ið føroyskar fyritøkur venda sær til útlendskar myndugleikar, bæði um áleikandi mál og um yvirskipaðar spurningar. Eftir førimuni verður leiðbeining og ráðgeving eisini veitt fyritøkum, serliga í teimum londum, har Føroyar hava sendistovur.

Í sambandi við tiltøk hjá sendistovunum og handilsferðir annars verður dentur lagdur á, at mentan og skapandi vinnur eru umboðað. Tað er við til at vekja størri ans og áhuga fyri Føroyum sum tjóð og kann eisini vera við til at menna nýggjar marknaðir fyri skapandi vinnur í Føroyum. Í hesum sambandi eigur meira miðvíst at verða samstarvað við m.a. Filmshúsið, Tónleikaútflutningsstovuna, FarLit, Mentamálaráðið og skapandi mentanar- og vinnuumhvørvið í Føroyum.

## 5.3 Fríhandilssáttmálar og arbeiðið fyri betri handilssømdum

Føroyar hava í løtuni fimm fríhandilssáttmálar. Hesir eru við ES, Ísland, Noreg, Sveis og Turkaland. Sum kunnugt varð sáttmálin við Ísland uppsagdur um ársskiftið, við gildi frá 1. januar 2020. Harumframt er fríhandilssáttmáli undirskrivaður við Bretland, og hevur Løgtingið góðkent henda sáttmála fyrr í vár.

## Turkaland

Fríhandilssáttmálin við Turkaland kom í gildi 1. oktober 2017. Við sáttmálanum hvarv tollurin á fiskavørum, ið verða útfluttar til Turkalands. Frammanundan var tollurin millum 20 og 40 prosent. Í sambandi við at sáttmálin kom í gildi, varð skipað fyri eini vinnuferð til Istanbul, har bæði innflutnings- og útflutningsfyritøkur tóku lut. Í juli 2018 var fyrsti felagsnevndarfundurin millum Føroyar og Turkaland sambært sáttmálanum.

## EABS

Í 2015 varð Eurasiatiska Búskaparsamveldið (EABS) sett á stovn. EABS er búskaparsamstarv millum Russland, Hvítarussland, Kasakstan, Kirgisia og Armenia, ið skipar londini sum ein innara marknað. Russland kann sostatt ikki einsamalt gera fríhandilssáttmálar við onnur lond, og landsstýrið arbeiðir tí fyri at gera ein fríhandilssáttmála við EABS, ið kann leggja handilsviðurskiftini við limalondini í eina fasta legu og tryggjar fría marknaðaratgongd.

Eitt týðandi fet á leiðini varð tikið, tá landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum og EABS-ráðharri skrivaðu undir semjuskjal (Memorandum of Understanding) millum Føroyar og Eurasiatiska Búskaparsamveldið í august 2018. Semjuskjalið er ein karmur um neyvari búskaparligt samstarv og øktan samhandil millum Føroyar og limalondini í EABS. Eisini er semjuskjalið grundarlagið undir eini felagsnevnd við umboðum úr Føroyum og EABS, ið hittist árliga og skal virka fyri øktum samstarvi partanna millum. Í sambandi við, at semjuskjalið varð undirskrivað í Føroyum, varð skipað fyri almennari vitjan fyri avvarðandi ráðharranum í EABS-nevndini.

Seinnu árini hevur russlandshandilin veruliga tikið dik á seg og er fleirfaldaður. Ein av orsøkunum til hetta eru geopolitisk viðurskifti millum eystur og vestur, sum Føroyar hava lítla ávirkan á. Russiska hertøkan av pørtum av Ukreina í 2014 økti munandi um spentu viðurskiftini millum Russland og m.a. ES og USA. Tó so, er framvegis nógvur samhandil millum partarnar – undantikið við matvørum – og eisini er virkið diplomatiskt samband. Broytast viðurskiftini á heimspolitiska pallinum og handilstiltøkini hjá Russlandi móti matvørum úr flestu vestanlondum verða tikin aftur, kann ein fríhandilssáttmáli við Føroyar vera við til framhaldandi at tryggja kappingarstøðuna á russiska marknaðinum.

Síðan sendistovan í Moskva varð sett á stovn í 2015, hevur verið arbeitt miðvíst við fleiri átøkum í royndunum at virka fyri einum fríhandilssáttmála millum partarnar. Fleiri handilsferðir og marknaðarátøk hava verið, eisini fyri at stimbra innflutningin av vørum úr Russlandi og hinum EABS-londunum til tess at undirbyggja ynskið hjá landsstýrinum um ein fríhandilssáttmála millum Føroyar og EABS.

Hóast útflutningurin til Russlands er vaksin nógv seinnu árini, er ynskið um at betra handilsviðurskiftini við Russland ikki nýtt. Føroyar og Russland skrivaðu undir fiskiveiðusáttmála í 1977 og um aldarmótið 2000 vóru í nøkur ár samráðingar um ein handilssáttmála millum londini. Føroyar útflyta fyrst og fremst uppsjóvarfisk og laks til Russlands.

## Kina

Kina er vorðin ein týdningarmikil samhandilspartur hjá Føroyum. Fyri at styrkja sambandið við kinesiskar myndugleikar, og royndirnar at bøta um marknaðaratgongdina til kinesiska marknaðin, eru fyrireikingar farnar í gongd at lata upp sendistovu í Beijing. Væntandi fer sendistovan undir sítt virksemi seinni í ár.

Eins og lond flest innflyta Føroyar hópin av vørum úr Kina og seinastu árini er Kina eisini vorðin ein av størstu marknaðunum fyri føroyskan útflutning. Tað er serliga øktur eftirspurningur og útboð av føroyskum laksi, sum er grundarlagið undir vaksandi útflutninginum til Kina. Tó verða eisini fleiri onnur fiskasløg seld til Kina, men ikki í líka stórum nøgdum sum laksur. Í 2016 skrivaðu landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum og umboð fyri kinesisku stjórnina undir heilsufrøðiliga protokoll. Hetta læt upp fyri, at Føroyar eisini kunnu útflyta makrel til kinesiska marknaðin.

Føroyar hava ikki fríhandilssáttmála við Kina, og tí verða fiskavørur tollaðar. Tollurin á vørur til Kina er umleið 10 prosent og tað ávirkar kappingarevnini hjá Føroyum á kinesiska marknaðinum, tí m.a. Ísland og Kili hava fríhandilssáttmálar við Kina. Íslendskir útflytarar selja fleiri av somu fiskasløgum til Kina, sum Føroyar. Ein av høvuðsútflutningsvørunum hjá Kili er laksur. Harafturat samráðast Kina og Noreg um ein fríhandilssáttmála.

Tað hevur tí stóran týdning, at Føroyar miðvíst virka fyri at fáa ein fríhandilssáttmála við Kina, sum tryggjar føroysku kappingarstøðuna á kinesiska marknaðnaðinum. Føroyska ynskið er borið fram fyri kinesiskum myndugleikum í fleiri førum, og hevur landsstýrismaðurin tvær ferðir verið í Beijing í hesum ørindum, eins og fleiri fundir hava verið á embætisstigi.

Fundirnir førdu til, at ein sendinevnd úr Kina kom til Føroyar á heysti 2018 fyri at kunna seg betur um føroysk viðurskifti.

Hóast føroyska ynskið um fríhandilssáttmála er umrøtt við kinesiskar myndugleikar, eru veruligar fríhandilsssamráðingar ikki fingnar í lag enn. Ætlanin við at seta sendistovu á stovn í Beijing er at vera til staðar og ávirka tilgongdina.

## Japan

Nógv samband hevur verið millum føroyskar og japanskar myndugleikar seinastu árini. Á fundi í Tokyo millum japanska uttanríkisráðharran og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum í fjør varð komið ásamt um, at londini skuldu fara undir at fyrireika tilgongdina at gera ein fríhandilssáttmála. Fleiri fundir hava síðani verið millum partarnar, bæði í Føroyum og í Japan. Talan er um umfatandi fyrireikingararbeiði, men politiskt er lagaliga løtan nú, tí sitandi uttanríkisráðharrin í Japan er sinnaður at gera avtalu um fríhandil við Føroyar. Arbeitt verður tí miðvíst við ætlanini.

Tað hevur eisini gagnað viðurskiftunum við Japan, at ein tingnevnd úr japanska tjóðartinginum *Diet* hevur vitjað í Føroyum og at vinnunevndin í Løgtinginum hevur vitjað í Japan. Somuleiðis hevur vinarbýaravtalan millum Taiji og Klaksvík styrkt samstarvið. At Japan er á veg úr International Whaling Commission, IWC, og tí vísir øktan áhuga at samstarva um hvalamál, kann eisini vera við til at styrkja viðurskiftini millum Føroyar og Japan.

Í løtuni er útflutningurin til Japan lutfalsliga avmarkaður, men Japan er millum heimsins størstu innflytarar av fiskavørum. Tí eru møguleikarnir á japanska marknaðinum stórir, serliga við tí í huga, at Føroyar eftir øllum at døma standa frammarlaga í røðini at samráðast við Japan. Tað hevði styrkt kappingarstøðuna, um samráðingarnar um ein fríhandilssáttmála bera á mál.

### USA

USA er eisini vorðin ein týðandi marknaður fyri føroyskar vørur. Tað er serliga laksur, sum er væl umtóktur í USA. USA hevur lutfalsliga fáar fríhandilssáttmálar og politikkurin hjá sitandi forseta hevur til endamáls í størri mun at verja heimamarknaðin í USA. Tí eru ikki útlit fyri, at framstig í hesum umfari verða gjørd fyri at skunda undir eina fríhandilstilgongd við USA. Í løtuni hava vit kappingarføra atgongd til amerikanska marknaðin fyri tær vørur, ið vit útflyta, og er varna støðan hjá amerikansku myndugleikunum í sambandi við fríhandilssáttmálar tískil ikki nakar trupulleiki undir verandi umstøðum.

Fyrr hevur møguleikin at gera ein sonevndan TIFA sáttmála (Trade and Investment Framework Agreement) verið umrøddur millum partarnar, seinast á fundi millum Rufus Gifford, sendiharra, og landsstýrismannin í 2016, sum eitt fyrsta stig í einum formligum samstarvi millum Føroyar og USA. Arbeiðið við hesi loysnini er fyribils steðgað, orsakað av vantandi áhuga frá amerikanskari síðu. Landsstýrið leggur tó dent á at hava góð sambond við USA og áhaldandi bera fram boðskapin um ein fríhandilssáttmála landanna millum.

Amerikanska lóggávan Marine Mamma Protection Act (MMPA) kann tó gerast ein avbjóðing fyri útflutning til USA í framtíðini. MMPA er sum útgangsstøði galdandi fyri USA, men í lógini er eisini ásett, at myndugleikarnir skulu banna innflutningi av fiskavørum, sum stava frá fiskaskapi ella aling, sum hevur við sær, at kópur ella onnur havsdújgjór doyggja ella verða álvarsliga skadd í størri mun enn eftir amerikonskum reglum.

Meginparturin av útflutninginum úr Føroyum til USA er alilaksur og skal hann halda fram eftir 1. jan. 2022, tá MMPA kemur í gildi, skulu føroyskir myndugleikar hava sett í verk eftirlitsskipanir viðv. havsúgdjórum, ið eru líka munadyggar sum eftirlitsskipanir hjá USA viðv. Havsúgdjórum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið samstarvar við Vinnuhúsið, Fiskimálaráðið og granskingarstovnar um at seta í verk neyðugu krøvini frá USA.

### Onnur lond

Av tí at eingin heilsufrøðilig avtala er millum Føroyar og Brasil, ber ikki til hjá føroyskum útflytarum at selja til Brasil, har vaksandi eftirspurningur m.a. er eftir saltfiski. Vinnan í Føroyum hevur tí heitt á landsstýrið um at virka fyri, at føroyskir útflytarar fáa atgongd til brasilska marknaðin. Fyri at røkka tí málinum hava heilsufrøðiligu myndugleikarnir í eina tíð arbeitt fyri at fáa í lag eina slíka avtalu, men m.a. vegna stjórnarskifti í Brasil, hevur tilgongdin verið drúgv. Gongd er komin á málið og samband er millum partarnar.

Umframt nevndu lond, verður støðugt arbeitt við at meta um, hvussu arbeiðsorskan skal raðfestast til tess at fáa betri marknaðaratgongd fyri føroyskan útflutning. Samskifti hevur millum annað verið við Suðurkorea í 2017, sum hevði við sær eina tolllækking. Onnur lond, sum møguliga eiga at verða raðfest, eru til dømis Kanada, Australia, India og onnur lond enn Brasil í Suðuramerika.

## 6. Evropa

Sum evropeisk tjóð, hava føroysk mentan og virði sín uppruna í europeiskum arvi. Av landafrøðiligum og siðmentaligum orsøkum er samstarv við londini í Evropa og við Evropasamveldið tí sum vera man av stórum týdningi.

Politiskt hevur Evropa verið fyri stórum broytingum seinnu árini. Bretland er á veg úr ES, flestu lond í Europa hava verið undir trýsti í sambandi við tilflyting og flóttafólk og spenta støðan bæði í ES og økti spenningurin millum eystur og vestur – saman við uttanhýsis hóttanum – kann vera við til at broyta fortreytirnar fyri europeiskum samstarvi. Broytingarnar seta eisini Føroyum krøv um at fylgja neyvt við gongdini, og at røkja og menna støðu Føroya sum land í Evropa.

## 6.1 Brexit

Á sumri 2016 atkvøddi ein meiriluti av bretska fólkinum fyri at fara úr ES. Tá varð samstundis greitt, at úrslitið fór at fáa ávirkan á Føroyar. Bretland er millum størstu keyparar av føroyskum vørum og Føroyar innflyta eisini nakað úr Bretlandi. Bretland er størsti innflytari av føroyskum vørum í Europa og saman við USA er Bretland næststørsti marknaður fyri føroyskar vørur.

Tískil fór landsstýrið eftir fólkaatkvøðuna um Brexit miðvíst til verka fyri at fáa formligu handilsviðurskiftini millum partarnar í fasta legu. Ein Brexit-bólkur við umboðum úr fleiri stjórnarráðum varð beinanvegin settur at fylgja gongdini.

Fleiri fundir hava verið á politiskum stigi millum landsstýrið og bretsku stjórnina, har víst varð á tørvin at tryggja samstarvið millum Føroyar og Bretland á bæði handilsliga- og fiskivinnuøkinum eftir Brexit. Somuleiðis legði sendistovan í London nógva orku í at gera vart við føroyska ynskið.

Sum úrslit av hesum miðvísa arbeiði, byrjaðu samráðingar millum Føroyar og Bretland um ein handilssáttmála á heysti 2018, og tann 31. januar 2019 varð fríhandilssáttmáli millum Føroyar og Bretland undirskrivaður. Løgtingið samtykti uppskotið um fríhandilssáttmála millum Føroyar og Bretland 3. apríl 2019.

Sáttmálin tryggjar framhald av verandi rættindum og skyldum á handilsøkinum sambært sáttmálanum millum Føroyar og ES, tó við neyðugum broytingum. Tá ið Bretland ikki longur er limaland í ES ella tá ein møgulig skiftistíð endar, heldur sáttmálin millum ES og Føroyar uppat at galda millum Bretland og Føroyar. Báðir partar eru komnir á mál við innanhýsis mannagongdum viðvíkjandi ígildissetan. Sáttmálin kemur sostatt í gildi, tá ein møgulig avtalað skiftistíð millum Bretland og ES er av, ella tann dagin Bretland fer úr ES uttan eina avtalu.

Óvissur hava valdað um útliman Bretlands úr ES. Uttan eina nýggja handilsavtalu millum Føroyar og Bretland hevði útgangsstøðið verið, at rættarliga grundarlagið undir handilspolitiska sambandinum við Bretland ikki longur hevði verið til, og sostatt kundi tollur verði lagdur á vørur úr Føroyum. Var ongin fríhandilssáttmáli millum Føroyar og Bretland, gjørdust Føroyar triðjaland hjá Bretlandi, og tá kundi tollur verði lagdur á tey fiskasløg, sum fylla mest í útflutninginum til Bretlands[1].

Fríhandilssáttmálin tryggjar sostatt at kalla ótarnað framhald í handilsviðurskiftunum við Bretland. Treytirnar í ES sáttmálanum um toll á ávísum virkaðum fiskavørum og kvotur á ávísum fiska- og landbúnaðarvørum halda fram. Kvoturnar minka niður í uml. 13,5 prosent av ES kvotunum, men hetta ávirkar ikki føroyskan útflutning ítøkiliga, tí lítil útflutningur hevur verið til Bretlands ella ES av viðkomandi vørum í fleiri ár.

---

[1] . Til dømis er triðjalandstollurin hjá ES á toski 12 prosent, á hýsu og upsa 7,5 prosent, á makreli 20 prosent og á laksi 2 prosent. Bretska stjórnin fráboðaði fyri 29. mars 2019, at um eingin avtala fekst við ES um útliman høvdu bretskir myndugleikar sett eina fyribilsskipan í verk, sum strikar tollin á stórum parti av innflutninginum úr øllum triðjalondum í eitt avmarkað tíðarskeið. Verandi útflutningur til Bretlands hevði verið fevndur av hesi skipan.

Undir samráðingunum varð frá føroyskari síðu víst á, at Føroyar leingi hava ynskt broytingar í handilssáttmálanum við ES. Bretskir myndugleikar boðaðu frá, at teir í verandi støðu hvørki høvdu heimild ella orku at gera stórvegis innihaldsligar broytingar í sáttmálaviðurskiftum við triðjalond. Uttan eina framhaldsavtalu hevði einki avtalugrundarlag verið undir handlinum millum Føroyar og Bretland.

Frá føroyskari síðu varð tó skotið upp at gera eina felagsyvirlýsing, sum ásetur, at partarnir eftirmeta atgongdina fyri fiska- og landbúnaðarvørur við tí fyri eyga at tryggja, at endamálsorðingin um fríhandil verður rokkin. Hesum uppskoti gingu bretar á møti og yvirlýsingin varð undirskrivað saman við fríhandilssáttmálanum 31. januar 2019.

Eftirmetingin fer at fara fram í felagsnevndini, sum skal hittast árliga og hvørs uppgáva tað er at tryggja, at sáttmálin virkar sum ætlað. Landsstýrið ætlar at taka avmarkingar, sum eru viðkomandi fyri Føroyar, upp á fyrsta felagsnevndarfundi eftir at sáttmálin er komin í gildi.

Brexit hevur eisini við sær broytingar í føroyskum fiskiveiðuáhugamálum. Eins og við handilsviðurskiftunum, er fiskiveiðupolitikkur felags málsøki í ES. Tí hava viðurskiftini millum Bretland og Føroyar á fiskiveiðuøkinum verið partur av samstarvinum millum ES og Føroyar. Eftir Brexit gerst Bretland tó sjálvstøðugt strandarland í Norðuratlantshavi. Tá verður tørvur á at skipa sínámillum viðurskifti Føroya við Bretland av nýggjum í eini tvíliðaðari avtalu. Eisini legst Bretland afturat fleirliðaða samstarvinum í Norðuratlantshavi um ferðandi fiskastovnar.

At Bretland verður sjálvstøðugt strandarland kann hava broytingar við sær í mun til býtið av kvotum í Norðuratlantshavi, men ikki fyrr enn Brexit er veruleiki og Bretland er viðurkent sum strandarland, byrjar tilgongdin at skipa viðurskiftini við atliti at einum nýggjum strandarlandi. Væntast kann, at Bretland fer at søkja um limaskap í NEAFC.

## 6.2 Styrkt samstarv við ES

Formligu viðurskifti Føroya við ES eru skipað í trimum sjálvstøðugum sáttmálum – einum handilssáttmála, einum fiskiveiðusáttmála og einum granskingarsáttmála. Grundleggjandi eru viðurskifti Føroya við ES øðrvísi skipað enn hjá flestu grannalondunum, ið antin eru limalond í ES, limalond í Europeiskia búskaparsamstarvinum (EBS), eru fevnd av ES serskipanum fyri umsøkjaralond ella grannalond, ella á annan hátt hava eitt formaliserað yvirskipað samstarv við ES. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at Grønland hevur støðu sum OCT (Overseas Countries and Territories) í mun til ES, og hevur eina serliga samstarvsavtalu. Hon er treytað av, at fiskiveiðiavtalan millum ES og Grønland, ið gevur ES ómissandi atgongd til grønlendska sjófeingið, er ein innbyggdur partur av teirra yvirskipaða samstarvi.

Fiskiveiðusáttmálin varð gjørdur í 1977, og kom í gildi í 1980. Talan er um ein rammusáttmála, og við støði í sáttmálanum avtala myndugleikar í Føroyum og ES árliga sínámillum fiskiveiðubýtið og atgongd partanna millum. Aðaltátturin í sáttmálanum er, at virðið á tí, partarnir lata hvørjum øðrum, skal javnviga.

Í 2010 skrivaðu Føroyar og ES undir sáttmála um granskingarsamstarv, og varð sáttmálin endurnýggjaður í 2014.

Núverandi handilssáttmáli varð undirskrivaður í 1996 og kom í gildi í 1997.

ES er størsti marknaðurin fyri føroyskan útflutning. Árini 2016, 2017 og 2018 eru millum 42-44 prosent av samlaða føroyska útflutninginum seld til limalond í ES. Útflutningurin til ES bæði í virði og nøgd hevur verið støðugt vaksandi seinastu 10 árini, men er kortini lutfalsliga minkaður í mun til samlaða útflutningin, tí samhandilin við londu

uttanfyri ES er øktur nógv seinnu árini. Í mong ár fóru upp ímóti 80 prosentum av føroyska vøruútflutninginum til ES.

Seinastu trý árini hava umleið 70 prosent av føroyska innflutninginum havt sín uppruna í ES. Í lutfalli og í virði hevur ES tí fyrimun í handilsjavnanum partanna millum.

Handilssáttmálin millum Føroyar og ES skipar handilsviðurskiftini millum partarnar. Sáttmálin tekur burtur allan toll á ídnaðarvørum millum ES og Føroyar, men hevur avmarkingar á landbúnaðar- og fiskivinnuøkinum. Tær fiskavørur, sum hava tollfría atgongd til ES-marknaðin, eru nágreinaðar í einum fylgiskjali til sáttmálan, tí sonevnda positivlistanum.

Um vørurnar verða virkaðar meiri, koma tær í flestu førum undir tollskyldu. Somuleiðis eru nakrar kvotur fyri tollfría atgongd fyri ávísar vørur.[2]

Flest øll uppsjóvar- og botnfiskasløg hava tollfría atgongd til ES, tá talan er um rundan og flaktan fisk og roykta laks, og tískil tryggjar sáttmálin tollfría atgongd til ES-marknaðin fyri at kalla allar fiskavørur, sum í dag verða framleiddar í Føroyum. At tollur er á liðugtvirkaðum vørum kann tó vera ein bági fyri at nýggjar útflutningsvørur at selja til ES verða mentar í Føroyum.

Annars eru bæði størri og smærri broytingar gjøgnum árini gjørd í sáttmálanum, sum hava havt við sær, at marknaðaratgongdin er batnað. Til dømis eru kvoturnar á pilkaðum rækjum og fiskafóðri hækkaðar, tollurin á feskum og frystum laksi er strikaður, umframt at útflutningskvotur eru fingnar í lag fyri saltaðan og turkaðan upsa og kúving. Í løtuni verður arbeitt við at beina burtur forðingar viðvíkjandi útflutningi av fiskafóðri og at fáa brisling á listan við tollfríum vørum.

Landsstýrið hevur eisini sett ynski fram um at avtaka positivlistan ella í øðrum lagi eisini fáa ein negativlista, t.v.s. í staðin fáa eitt yvirlit yvir tær vørur, sum ikki kunnu útflytast tollfrítt til ES-marknaðin. Føroyska ynskið hevur ongantíð vunnið frama í ES. Millum annað hevur ES ført fram, at skal gevast eftir í mun til handilssáttmálan við Føroyar, mugu Føroyar lata ES okkurt afturfyri. Hóast ES hevur stóran fyrimun í handilsjavnanum við Føroyar, er tað ein sannroynd, at føroyski marknaðurin er avmarkaður – eisini hóast Føroyar veita ES fult tollfrælsi á so at siga øllum vørum.

Føroyar hava síðan 2005 verið partur av Pan-Euro-Med samstarvinum um felags upprunareglur. Skipanin loyvir, at vørur kunnu skifta uppruna eftir næri ásettum treytum.

Føroyskar fyritøkur kunnu t.d. keypa fisk úr øðrum londum, virka hann í Føroyum og síðan útflyta hann sum føroyskan fisk. Fortreytin er, at Føroyar hava fríhandilssáttmála við landið, rávøran verður keypt úr, og at landið, vøran verður keypt úr, eisini hevur fríhandilssáttmála við landið, endaliga vøran verður seld til.

Fyri at menna viðurskiftini við ES og vekja størri áhuga fyri Føroyum, virkar landsstýrið fyri einum breiðari samstarvskarmi millum partarnar. Føroyar og ES hava ikki nakran yvirskipaðan samstarvskarm, ið fevnir um annað og meira enn handil, fiskiveiðu og gransking. Ein tvørgangandi karmur kundi verið við til at lagt upp til

[2] Kvoturnar á fiskavørum eru fyri síl, niðursjóðað rogn, niðursjóðaðan fisk, rækjur, krabba, kúving og turkaða og saltaðan upsa. Kvota er eisini fyri útflutning av landbúnaðarvørum og viðvíkjandi útflutningi av fiskafóðri. Harafturat er brislingur ikki nevndur á positivlistanum.

betri samskipan og samskifti á økjum, har samstarv longu er, og eisini kunnað slóðað fyri nýggjum samstarvsmøguleikum.

Sum eitt strategiskt grundarlag eigur ein tílíkur karmur at vera opin og fevna um øki, sum bæði ES og Føroyar hava áhuga í at menna – hvør í sínum lagi og í felag. Millum annað innan talgilding, útbúgving t.d. Erasmus+, samstarv um mentan og skapandi vinnur, t.d. Creative Europe, grønar orkuloysnir og burðardyggan bláan vøkstur, sjóvinnu og maritimar tænastur, flogvinnu, burðardygga fyrisiting og nýhugsan í fiskivinnu og alivinnu og ferðavinnu.

Sum liður í ætlanini um ein breiðari samstarvskarm verður eftir ætlan skipað fyri einum kunnandi tiltaki um viðurskiftini millum Føroyar og ES, tá felagsnevndarfundur verður um handilssáttmálan í Føroyum seinni í ár. Ætlanin er at varpa ljós á verandi samstarv og á nýggjar møguleikar. Eftir ætlan fara umboð fyri politisku skipanina í Føroyum, fyri ES, úr vinnuni og uttanveltaðir serfrøðingar at umrøða møguleikar og avbjóðingar í viðurskiftunum millum Føroyar og ES.

Eisini er hjá landsstýrinum umráðandi at hava í huga, at sjálvt um flestu av samstarvsøkjunum, Føroyar hava við londini í Europa, eru stýrd í ES, so eru tað limalondini, sum í felag skapa og reka ES. Við øðrum orðum fevnir ES víðari enn Brússel. Tí mugu sambondini við londini hvør sær eisini raðfestast. Serliga tey lond, sum Føroyar hava stóran samhandil við ella har sum samstarv er á øðrum økjum. Við góðum og støðugum sambondum og samskifti ber til at økja um tilvitan og kunnleika um Føroyar og fáa størri undirtøku fyri at menna viðurskiftini millum ES og Føroyar. Ítøkilig úrslit eru at hóma, og fleiri samstarvspartar í ES-kervinum eru vorðnir greiðir yvir, at tíðin er komin til at skapa ein tíðarhóskandi karm fyri sínámillum samstarvi við Føroyar, sum eitt grannaland í Evropa.

## *6.3 EFTA*

EFTA varð stovnað í 1960, sum eitt slag av mótsvari til ES (fyrr EEC), sum varð stovnað í 1957. At byrja við vóru Danmark, Svøriki, Eysturríki, Stórabretland, Noreg, Portugal og Sveis í EFTA. Seinni eru fleiri av hesum londunum farin uppí ES, og síðani hevur EFTA í mangar mátar verið ein felagsskapur, ið fær minni týdning.

Í dag eru Noreg, Ísland, Sveis og Liktenstein við í EFTA. Hesi eru – Sveis undantikið – eisini partar av Evropeisku Búskaparsamgonguni, EBS, ið harumframt telur ES og limalondini í ES.

Føroyar fóru burturúr EFTA, tá ið Danmark gjørdist limur í ES 1. januar 1973.

Í føroyskum politikki tykist breið semja vera um, at vit ikki skulu gerast limir í ES. Flestu politisku flokkar kundu hugsað sær atgongd til innmarknaðin, men hetta telur tó ikki nóg mikið til, at vit vilja ganga undir mótkravið um fult og heilt at taka við ES reglum, m.a. at lata okkara fiskivinnu gerast part av felags fiskivinnupolitikkinum í ES.

EFTA londini samstarva sum millumtjóða felagsskapur á leysari grundarlagi enn ES, serliga sum fríhandilsøki. EFTA hevur gjørt handilsavtalu við eina røð av londum, og møguleikin fyri at gerast partur í hesum avtalum hevur í stóran mun verið drívmegin í føroysku royndunum at gerast partur av EFTA. Viðmerkjast skal, at EFTA limaskapur í sær sjálvum ikki hevði givið treytaleysa atgongd til hesar sáttmálar, men hugsandi er, at avvarðandi sáttmálalond høvdu verið sinnað at víðka handilssáttmálarnar til Føroyar, um vit gjørdust partur av EFTA.

Skiftandi landsstýri hava gjøgnum árini arbeitt fyri, at Føroyar gerast limur í EFTA, men áhugin millum limalondini fyri føroyskum limaskapi er misjavnur. Tískil eru útlitini fyri føroyskum EFTA- limaskapi avmarkað, sum støðan er.

## *6.4 Hoyvíkssáttmálin*

Hoyvíkssáttmálin kom í gildi 2006 og umframt at fevna um vøruhandilin, fevnir sáttmálin eisini um frælsi fyri tænastur, persónar og kapital. Sáttmálin er tí tann mest víðfevndi fríhandilssáttmáli, Føroyar hava havt við onnur lond. Endamálið var at binda Føroyar og Ísland saman í eitt felags búskaparøki, har vørur, tænastur, persónar og kapitalur kunnu flyta frítt millum londini. Landsstýrið segði Hoyvíkssáttmálan upp 31. desember 2019.

### Lógin um sjófeingi

Við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ið Løgtingið samtykti 18. desember 2017, skulu allir eigarar av teimum feløgum, sum fáa og varðveita veiðurættindi, vera heimahoyrandi í Føroyum frá 1. januar 2022. Nýggju treytirnar gera tað truplari hjá útlendskum likamligum persónum at etablera seg í føroysku fiskivinnuni við at eiga í føroyskum feløgum.

Eftir at landsstýrið legði uppskot um fyrisiting av sjófeingi fyri Løgtingið, gjørdu íslendskir myndugleikar á ymiskan hátt vart við, at íslendskir íleggjarar hava gjørt íløgur í Føroyum í góðari trúgv og at avmarkingarnar eru brot á ásetingarnar í og endamálið við Hoyvíkssáttmálanum.

Síðani løgtingslógin um sjófeingi varð samtykt, hava føroyskir og íslendskir myndugleikar samskift og tingast um avleiðingarnar av ásetingunum um útlendskan ognarskap í veiðiliðinum í føroysku fiskivinnuni. Landsstýrið hevur mótvegis íslendskum myndugleikum skotið upp at tillaga Hoyvíkssáttmálan soleiðis, at ognarskapur í veiðiliðinum í fiskivinnuni verður undantikin frá virkisøki sáttmálans. Á hendan hátt kundi sáttmálin hildið fram, samstundis sum hann kundi verið tillagaður til nýggju umstøðurnar.

Til uppskot landsstýrisins um at tillaga Hoyvíkssáttmálan hava íslendskir myndugleikar sett ta treyt, at Føroyar skulu tryggja áhugamálini hjá íslendskum íleggjarum í Føroyum á nøktandi hátt.

Tá ið tað gjørdist greitt, at tað ikki fór at eydnast at gera eina hóskandi semju við íslendsku stjórnina um at gera neyðugar tillagingar í Hoyvíkssáttmálanum til tess at tryggja samsvar millum sjófeingislógina og altjóða sáttmálaskyldur Føroya, varð tískil neyðugt hjá landsstýrinum at biðja Løgtingið um heimild at seta Hoyvíkssáttmálan úr gildi.

Sáttmálin kann sambært grein 12 í Hoyvíkssáttmálanum sigast upp við fráboðan frá øðrum sáttmálapartinum til hin, og uppsagnarfreistin er 12 mánaðir. Í grein 12, stk. 2 er ásett, at fyrimunir, sum íleggjarar ella tænastuveitarar hjá øðrum sáttmálapartinum sambært sáttmálanum hava fingið frá hinum sáttmálapartinum, skulu verða verandi í gildi í minsta lagi í 5 ár eftir, at sáttmálin gongur út. Fyri íslendskar íleggjarar í feløgum við veiðirættindum merkir hetta, at íleggjararnir hava krav upp á at varðveita galdandi treytir í minsta lagi í 5 ár frá tí degi, at sáttmálin fer úr gildi.

### Framtíðin

Tá uppsagnarfreistin er farin 1. januar 2020 og sáttmálin fer úr gildi, eru Føroyar og Ísland ikki longur bundin at veita føroyingum og íslendingum teir fyrimunir, sum partarnir í dag geva hvør øðrum í ymsum serlógum. Um ikki annar ella broyttur sáttmáli kemur í staðin fyri Hoyvíkssáttmálan, mugu báðir partar tískil taka støðu til, um teir hvør sær vilja gera lógarbroytingar, ið taka burtur fyrimunir, sum sáttmálin í dag veitir.

Landsstýrið ynskir ikki at koma í ta støðu, at ongin sáttmáli regulerar viðurskiftini og serliga handilin millum Ísland og Føroyar. Landsstýrið fer at virka fyri at fáa semju við íslendsku stjórnina um nýggjan sáttmála fyri at tryggja, at

samhandilin millum partarnar kann halda fram, samstundis sum samsvar er millum sáttmálagrundarlagið og føroyska lóggávu.

Landsstýrismaðurin sendi í mars 2019 íslendska uttanríkisráðharranum bræv, við uppskoti um at finna eina nøktandi loysn fyri handilin av vørum millum londini, evt. ein nýggjan handilssáttmála, sum er avmarkaður til vøruhandil, soleiðis at vit ikki koma í ta støðu, at tollur verður álagdur, tá Hoyvíkssáttmálin eftir ætlan fer úr gildi.

# 7. Menningarsamstarv og neyðhjálp

Menningarsamstarv og neyðhjálp fella undir virksemið hjá almennu Føroyum úti í heimi. Økið hevur havt hægstu raðfesting hjá landsstýrinum og játtanin er fleirfaldað seinnu árini, úr trimum upp í níggju milliónir um árið. Økta játtanin er ein liður í at Føroyar, sum eitt ríkt og framkomið land, taka størri ábyrgd í altjóða samfelagnum og eru við til at  menna og hjálpa, har møguleikar og tørvur eru.

## *7.1 Menningarsamstarv*

Til ber at siga, at leið Føroya í altjóða menningarsamstarvi er skipað í tveimum: i) í Føroyum at eggja til og tryggja føroyska luttøku í altjóða menningarsamstarvi og ii) úti í heimi at samstarva við felagar, ið kunnu vera við til at tryggja eina effektiva føroyska luttøku og íkast í altjóða menningarsamstarv og humanitera hjálp.

Tey 17 Heimsmálini hjá Sameindu Tjóðum eru eisini stavnhald Føroya í menningarsamstarvi. Landsstýrið metir tað vera skilabest at leggja dent á mál 14, ið snýr seg um lívið í sjógvi og vatni – eitt øki, har Føroyar eru millum fremstu lond í heiminum innan menning og nýskapan og tí kunnu veita eitt munadygt íkast. Men Føroyar eru eisini framkomin tjóð á øðrum økjum, sum tørvur er á í menningarsamstarvi. Útbúgving, góð heilsa og javnrættindi, sum eisini eru grundleggjandi fortreytir fyri burðardygga menning og eru tí eisini raðfest menningarmál.

Arbeitt hevur verið við at menna ein nýggjan leist at skipa leiklut Føroya í altjóða menningarsamstarvi og neyðhjálp meira miðvíst eftir, soleiðis at tað í størri mun verða føroysk vitan og føroyskir førleikar, heldur enn einans føroyskir pengar, ið standa fyri føroyska íkastinum í altjóða menningarsamstarvi og humaniterum arbeiði.

Sostatt verður farið frá einans at lata stuðul og partsfígging til verkætlanir hjá ikki-stjórnarligum felagsskapum til at skipa arbeiðið í (strategiskum) partaløgum við bæði almennar stovnar, privata vinnulívið og felagsskapir heima og altjóða, so tað í alsamt størri mun samsvarar við føroysk áhugamál. Tí á teimum økjum, har Føroyar hava áhugamál, hava Føroyar eisini vitan og førleikar at bjóða fram.

Bæði almennir stovnar, privatar fyritøkur og felagsskapir í Føroyum liggja inni við vitan og við førleikum, sum kunnu vera við til at skapa menning og framburð, har tørvur er á tí og har møguleikar eru fyri tí. Sum dømi kann nevnast, at partur av játtanini til menningarsamstarv er nýttur til eina verkætlan, sum Fróðskaparsetur Føroya hevur staðið fyri í samstarvi við African Institute of International Law. Talan var um eitt skeið í altjóða landsgrunsrætti, sum varð hildið í Tansania og sum serfrøðingar við tilknýti til Fróðskaparsetrið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Jarðfeingi stóðu fyri. Skeiðið var ætlað fakfólkum í menningarlondum, ið hava møguleika at gera landgrunskrøv uttanfyri 200 fjórðingar, men hava avmarkaða vitan og førleikar at fara undir arbeiðið at gera landgrunskrøv, ið kunnu vera við til at tryggja nýggjar inntøkur í menningarlondum.

Møguleikin fyri at bjóða fólki úr menningarlondum til Føroya at nema sær kunnleika verður eisini troyttur. Í ár fer Fiskaaling at bjóða út eitt tíðaravmarkað lærustarv til ein viðkomandi persón úr menningarlandi, har aling er á menningarstigi og brúk er fyri vitan. Eftir lokna starvstíð kann viðkomandi fara aftur til heimland sítt við nýggjari vitan, eins og føroyskt vinnulív eisini kann fáa gagn av einum øðrvísi perspektivi.

Talan er í hesum førum um tvær royndarverkætlanir, ið skulu vera við til at slóða fyri, at íkast Føroya til altjóða menningarsamstarv verður meira miðvíst. Málið er, at bæði almennir vitnanarstovnar og privatar fyritøkur fáa møguleika at gerast partur av verkætlanum, sum kunnu vera við til at skapa menning úti í heimi, men samstundis sjálvar kunnu fáa gagn av at taka lut í slíkum samstørvum.

Ein stórur partur av tí menningarsamstarvi, sum fer fram í dag, er skipað í ST høpi. Føroyar leggja seg eftir at brúka atlimaskapirnar í FAO (Matvøru- og landbúnaðarstovninum hjá ST) og UNESCO (Mentanar- og útbúgvingarstovninum hjá ST) sum karmar fyri menningarsamstarvi. Talan er um felagsskapir, sum eru væl kjølfestir í heimssamfelagnum og í Føroyum, og virka innan okkara raðfestu øki í menningarsamstarvi. Teir hava eitt breitt undirstøðukervi um allan heim og væl skipaðar menningarskráir, ið kunnu virka sum grundarlag undir framtíðar føroyskum innsatsi innan altjóða menningarsamstarv. Felagskapirnir, Føroyar eru atlimir í, kunnu sostatt sum samstarvsfelagar vera við til at røkka verkætlanum, stovnum og lokalsamfeløgum, har føroysk vitan og føroyskir førleikar kunnu gera gagn og tryggja burðardygga menning.

Umframt at raðfesta atlimaskapir Føroya í ST-felagsskapum, raðfestir landsstýrið eisini sonevnda LON-samstarvið, ið er samstarv millum heimsins stórhavstjóðir (*Large Ocean Nations*). Talan er um tjóðir, ið á sama hátt sum Føroyar fyrst og fremst liva av havtilfeingi og hava ræði á stórum havøkjum. Endamálið er at samstarva um at menna nýskapandi gagnnýtslu av sjófeingi og deila ítøkiliga vitan og royndir sum oyggjalond kring heimin til frama fyri skilagóða umsiting av havinum og livandi tilfeingi tess.

### *7.2 Neyðhjálp*

Landsstýrið letur neyðhjálp til vanlukkurakt ella krígsherjað øki. Sum oftast verða pengar latnir til útvald endamál í raktum økjum á tann hátt, at landsstýrið letur einum felagsskapi, sum virkar á staðnum, stuðul. Seinnu árini eru tað serliga World Food Programme og Reyði Krossur, sum hava tikið ímóti neyðhjálp frá landsstýrinum. Undantøk eru kortini. Millum annað tá ið ein jarðskjálvti elvdi til herviliga flóðaldu, ið rakti grønlendsku bygdina Nuugaatsiaq í 2017, og landsstýrið læt neyðhjálp beinleiðis til grønlendska landsstýrið.

Sum liður í at fokusera leiklut Føroya í altjóða neyðhjálpararbeiði og at raðfesta føroyska luttøku í sambandi við humanitert arbeiði, verður arbeitt við at gera langskygdar samstarvsavtalur við neyðhjálparfelagsskapir. Fyrr í ár varð avtala undirskrivað við Reyða Kross og samskifti er eisini við World Food Programme. Endamálið er at lata upp fyri møguleikanum at føroyingar í samstarvi við hesar felagsskapir kunnu førleikamennast at taka virknan lut í altjóða humaniterum virksemi. Sum liður í samstarvsavtaluni millum Reyða Kross og landsstýrið verður skipað fyri útbúgving og útsending av føroyingum at taka lut í humaniterum uppgávum úti í heimi komandi árini.

## 8. Norðurlandamál

Føroyar hava luttikið aktivt í norðurlendska samstarvinum í drúgva tíð. Norðurlond eru høgt í metum á altjóða pallinum, og hava bæði virðing og álit millum heimsins lond. Norðurlendska samstarvið er umráðandi liður í

føroyskum uttanríkispolitikki. Føroyar hava drúgvar royndir frá norðurlendska samstarvinum, og hetta hevur gagnað landi okkara fakliga og fíggjarliga. Við norðurlendska samstarvinum hava vit atgongd til ein pall, har vit kunnu vísa á okkara førleikar og samstarva á jøvnum føti við okkara grannalond. Vit kunnu harvið ávirka á høgum, politiskum stigi, og føroysk serfrøði fær møguleikan at gagnnýta norðurlendsk netverk og fígging í mongum viðurskiftum.

Kortini eru avmarkingar.

### 8.1 Føroyskur limaskapur

Royndir hava verið gjørdar at vinna Føroyum sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum og í Norðurlendska ráðharraráðnum (NMR). Landsstýrið hevur havt stórt fokus á hetta arbeiði tey seinastu árini, men higartil hava royndirnar ikki borið á mál. Víst hevur verið til ríkisrættarligu støðu Føroya og til Helsingforssáttmálan, ið er grundarlagið undir norðurlendska samstarvinum, sum forðingar fyri sjálvstøðugum føroyskum limaskapi.

Norðurlendska stjórnarsamstarvið er skipað innan Norðurlendska ráðharraráðið. Norðurlendsku forsætismálaráðharrarnir hava evstu ábyrgd av samstarvinum, eins og tað eru teir, ið seta nýggj, stór mál á skrá. Løgmaður luttekur í sera avmarkaðan mun á forsætisráðharrafundunum.

Samstarvsráðharrarnir hava dagligu ábyrgdina av fíggjarliga partinum av norðurlendska samstarvinum. Føroyski samstarvsráðharrin luttekur í øllum virksemi hjá samstarvsráðharrunum. Ráðharraráðini eru 10 í tali, tað er samstarvið innan ymisku fakøkini.

### 8.2 Danskur formansskapur

Í 2020 hevur Danmark formansskapin í NMR. Sum partur av ætlanunum hjá Landsstýrinum um at økja um føroyska leiklutin í norðurlendska samstarvinum, fara Føroyar at standa á odda fyri norðurlendska samstarvinum innan tvey ráðharraráð, orkumál og ráðharraráðið fyri fiskiskap, landbúnað, matvørur og skógarrøkt.

Tríggjar formansskapsverkætlanir verða skipaðar, har Føroyar, Grønland og Danmark standa á odda fyri hvør sínari. Tann føroyska verður innan orkuøkið, og snýr seg m.a. um grøna orku til smá samfeløg, ið liggja uttanfyri felags netið á norðurlendska meginlandinum. Yvirskipaða yvirskriftin á formansskapinum í 2020 er ”Fremtidens løsninger”. Ein formansskapsverkætlan hevur við sær 15 mió. DKK úr norðurlendsku skipanini. Formansárið fer at geva Føroyum møguleikan at ávirka dagsskránna í norðurlendska samstarvinum hetta árið, eins og fleiri fundir, ráðstevnur og annað verða í Føroyum. Mett verður, at fundarvirksemi o.s.fr. í formanssárinum fer at føra við sær upp ímóti 1000 hotelgistingar, og týdningurin av hesi eksponering millum okkara grannalond eigur ikki at undirmetast.

## 9. Ímyndin av Føroyum úti í heimi

Umdømið hjá einum landi hevur stóran týdning. Eins og fyritøkur, vørur og einstaklingar hava síni *brand*, skapar ímyndin, sum fólk hava av einum landi, eitt tjóðarbrand. Tí verður arbeitt miðvíst við at veita umheiminum viðkomandi kunning um Føroyar og føroysk viðurskifti á fleiri talgildum pallum.

Ein jalig ímynd økir um áhugan fyri einum landi og kann tí skapa møguleikar at samstarva politiskt, mentanarliga og vinnuliga. Ímyndin av Føroyum hevur serligan týdning fyri føroyskan útflutning, tí eyðsæð er, at ímyndin, eitt

land hevur, ávirkar áhugan at keypa vørur úr viðkomandi landi. Talgilda kunningartøknin hevur kollvelt miðlarnar. Internetið ger kunning og vitan atkomulig fyri ein og hvønn, og tíðindi kunnu ferðast í einum heraðshorni av heiminum til eitt annað í eini handarvending.

Uttanríkistænastan umsitur heimasíðurnar www.FaroeIslands.fo, www.Whaling.fo og www.FaroeseSeafood.com. Seinnu árini hevur arbeiðið við hesum pallum verið raðfest frammarlaga. Heimasíður eru eitt munagott amboð, og eitt hent og lutfalsliga ódýrt amboð, ásannandi at fíggjarliga og starvsfólka tilfeingið hjá Uttanríkistænastuni er avmarkað.

## *9.1 FaroeIslands.fo*

FaroeIslands.fo er almenn kunningarsíða um Føroyar og lýsir føroyska samfelagið, mentanina, politisku skipanina og vinnulív. Heimasíðan er somuleiðis ein leiðbeinari til viðkomandi stovnar og aðrar føroyskar heimasíður. Kunnleikin um Føroyar er avmarkaður úti í heimi, og endamálið er tí at veita góða kunning um tey evni, fólk sóknast eftir um Føroyar, og lofta áhugan hjá fólki, sum vilja vita meira um Føroyar og hvat Føroyar hava at bjóða. Yvirskipaða endamálið er somuleiðis, at kunning um Føroyar skal koma úr Føroyum.

Visit Faroe Islands hevur rokkið stór úrslit í teirra marknaðarføring og økt um áhugan fyri Føroyum. Visit Faroe Islands marknaðarførir Føroyar sum ferðafólkamál – eitt destination brand – og vendir sær fyrst og fremst til ferðafólk. Málbólkarnir hjá FaroeIslands.fo eru miðlar, vinnulív, myndugleikar, felagsskapir og granskarar og yvirskipaða endamálið er at sýna fram Føroyar sum samstarvspart.

Knýtt at Faroeislands.fo er eisini Faroe Islands Newsletter, sum verður lagt út hvønn mánað, og sum fólk kunnu tekna seg at móttaka. Endamálið við tíðindabrævinum er somuleiðis at framleiða tilfar til sendistovurnar at nýta á Facebook síðunum hjá sendistovunum.

Google er høvuðsamboðið, tá fólk leita eftir kunning á internetinum. Tí hevur miðvíst verið arbeitt við at Faroeislands.fo skal verða sjónlig, tá leitað verður eftir Føroyum á Google. Hetta verður á fakmáli nevnt SEO (Search Engine Optimization). Hetta arbeiðið hevur eydnast væl og FaroeIslands.fo telist millum fremstu heimasíður í leitiúrslitinum, tá leitað verður á Google eftir Faroe Islands og øðrum leitiorðum, sum eru viðvíkjandi Føroyum. Talið av vitjandi er vaksið nógv síðani heimasíðan varð endurnýggjað í nýggjum líki á heysti 2015. Í 2018 hevði Faroeislands.fo góð 125.000 ymisk vitjandi. Góð 95 prosent av teimum vitjandi vóru uttan úr heimi, og heimasíðan telist millum tær føroysku heimasíðurnar, sum hava flest vitjandi uttan úr heimi.

## *9.2 Whaling.fo*

Uttanríkistænastan hevur seinastu árini á hvørjum ári fingið gjørt greiningar av umrøðuni av Føroyum í tíðinda- og sosialum miðlum kring heimin. Tá viðvíkur Føroyum er grindadráp tað evni, sum fær størstu umrøðu bæði í tíðinda- og sosialum miðlum.

Í 2015 legði Uttanríkistænastan eina nýggja samskiftisstrategi kring grindadráp. Nýggja strategiin varð løgd, ásannandi at tað í nógv størsta mun vóru mótstøðufólk av grindadrápi, ið settu dagsskránna í umrøðuni av grindadrápi í altjóða miðlum. Umrøðan var í stóran mun merkt av mísvísandi upplýsingum, og at føroyingar og føroysku sjónarmiðini mestsum ikki komu til orðanna í umrøðuni.

Endamálið við nýggju strategiini var tí, at fakta og føroysku sjónarmiðini í størri mun skuldu koma til sjóndar. Heimasíðan www.whaling.fo, sum hevði nøkur ár á baki, varð endurnýggjað í nýggjum hami við einum greiðum og rámandi boðskapi og fakta um grindadráp. Samstundis varð skipað ein miðlatilbúgving í Uttanríkistænastuni, sum hevur til endamáls at tryggja, at fyrispurningar frá miðlum um grindadráp verða svaraðir stundisliga og royna at fáa rættað skeivleikar um grindadráp í miðlum, og gera vart við, tá føroysk sjónarmið ikki vórðu tikin við.

Sum heild kann sigast, at nýggja strategiin hevur eydnast. Miðlaumrøðan av grindadrápi er í dag merkt av, at føroysku sjónarmiðini og fakta - so sum at grindadráp er burðardygt - koma týðiliga fram í tíðindaflutninginum. Miðlaumrøðan og grindamótmæli á sosialum miðlum er ikki líka umfatandi sum fyri nøkrum árum síðani.

### *9.3 FaroeseSeafood.com*

Í mars 2019 varð heimasíðan www.FaroeseSeafood.com almannakunngjørd. FaroeseSeafood.com er eitt samstarv millum Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Fiskimálaráðið, Føroya Ráfiskakeyparafelag, Føroya Reiðarafelag og Føroya Ráfiskaseljarafelag.

Heimasíðan er ein kunningarsíða um føroyskan sjómat og Føroyar sum fiski- og alivinnutjóð, og ein pallur fyri marknaðarføring og branding av føroyskum fiskaútflutningi. Heimasíðan inniheldur eisini eitt Exporter Directory, ið er eitt yvirlit yvir útflytarar av føroyskum fiskavørum. Endamálið við yvirlitinum er, at tað skal verða lætt hjá keyparum at finna fram til føroyskar útflytarar.

Sum partur av verkætlanini eru eisini nakrir matgerðarfilmar við Gutta Winther framleiddir í samstarvi við Visit Faroe Islands, og Visit Faroe Islands fer at nýta filmarnar í teirra marknaðarføring á sosialum miðlum.

## 10. Veiðufelagsskapir

Føroyar samstarva við nógv lond um tilfeingi í havinum ígjøgnum luttøku í millumtjóða felagsskapum. Hesir eru økisbundnu fiskiveiðufelagsskapirnir NEAFC, NAFO, NASCO og SPRFMO, umframt økissamstarv um hval og kóp í Norðuratlantshavinum innan NAMMCO. Tá talan er um altjóðarættarligar sáttmálar, ið viðvíkja bæði Føroyum og Grønlandi, luttaka Føroyar undir heitinum DFG (Danmarkar kongsríki, Føroyum og Grønlandi viðvíkjandi).

### *10.1 NEAFC*

Føroyar eru við í NEAFC (North East Atlantic Fisheries Commission), sum er millumtjóða felagsskapur fyri fiskiskapin í landnyrðingspartinum av Atlantshavi. Umframt DFG eru ES, Ísland, Noreg og Russland limalond. Hvør sáttmálapartur hevur eina atkvøðu. NEAFC-sáttmálin fevnir um alt havtilfeingið í sáttmálaøkinum. Tó eru undantikin nøkur - ferðandi fiskasløg, eitt nú tunfiskur, feskvatnsfiskur og ávís hávasløg, sum eru fevnd av øðrum altjóða sáttmálum.

Føroyar eru strandarland fyri flestu fiskasløg, sum NEAFC ger samtyktir fyri. Talan er tískil um sera viðkomandi felagsskap fyri Føroyar, og eins og hjá hinum strandarlondunum er umráðandi hjá okkum at tryggja, at fiskiskapurin í altjóða sjógvi er burðardyggur.

Føroyar hava eisini áhugamál í teimum djúphavsfiskasløgum, sum eru at finna í altjóða sjógvi í NEAFC-økinum, t.d. búrfiski, stinglaksi og blálongu. Talan er um meiri avmarkaða nøgd, enn tá ræður um uppsjóvarfisk.

Tá ið talan er um ferðandi fiskastovnar, sum eru í havøkinum hjá limalondunum og í altjóða sjógvi, er skipanin vanliga hon, at londini semjast um eina heildarkvotu og eitt býti í sínámillum sjógvi, umframt um eitt uppskot um fiskiskap í altjóða sjógvi. Samtyktin um altjóða sjógv verður síðan løgd fyri NEAFC til samtyktar.

## 10.2 NAFO

NAFO (Northwest Atlantic Fisheries Organization) er millumtjóða felagsskapur fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í útnyrðingspartinum av Atlantshavi. Umframt DFG eru limalondini Kanada, ES, Noreg, Ísland, Russland, Suðurkorea, Japan, USA, Kuba, Ukraina og Frakland vegna St. Pierre og Miquelon.

Føroyski fiskiskapurin í altjóða sjógvi í NAFO-økinum hevur serliga verið eftir toski á FlemishKap (3M) og eftir rækju á Flemish Kap og Grand Bank (3L). Harumframt hava Føroyar smærri kvotur av svartkalva og kongafiski.

Føroyar hava 22,35 % av býtinum av toski á Flemish Kap. Tað er tað mesta, sum eitt einstakt land hevur. ES hevur 57,03 %, sum verða lutað millum níggju limalond, har Portugal og Spania fáa størstu partarnar. Í 2019 var føroyski parturin av toskakvotuni 4000 tons.

## 10.3 NASCO

NASCO (North Atlantic Salmon Conservation Organisation) er millumtjóða felagsskapur fyri umsiting av laksafiskiskapi í Norðuratlantshavi. Føroyar luttaka saman við Grønlandi undir heitinum DFG. Hini limalondini eru ES, Kanada, Noreg, Russland og USA. Seinastu tjúgu árini hava Føroyar, í samsvari við lívfrøðiligar metingar hjá ICES, ikki rikið havfiskiskap eftir laksi. Stórur partur av laksastovnunum í Norðuratlantshavi verður mettur at vera sera illa fyri. Til havs verða ymsu laksastovnarnir fiskaðir saman, og ansast kann ikki eftir støðuni í einstøku áunum. Tí verður havfiskiskapur eftir laksi mettur at vera serliga trupul at umsita. Føroyar hava tó áhaldandi víst á rætt sín at veiða laks í føroyskum sjógvi og hava víst á skylduna hjá hinum limalondunum at bøta um støðuna í teirra áum. Hini limalondini í NASCO hava kortini hildið fram við at veiða laks í áum og firðum í størri og minni mun, og NASCO hevur onga formliga heimild at skipa tílíkan fiskiskap.

Føroyar verða vertir fyri ársfundinum 2020.

## 10.4 SPRFMO

Í 2009 varð semja fingin í lag at seta á stovn økisbundna felagsskapin SPRFMO (South Pacific Regional Fisheries Management Organisation), sum skal umsita fiskiskap í Suðurkyrrahavi. Sáttmálin fevnir um veiðu eftir botnfiski og uppsjóvarfiski sum eitt nú rossamakreli, tó ikki veiðu eftir víðferðandi fiskastovnum so sum tunfiski.

Hini limalondini eru Australia, Belize, Kili, Kina, Cook Islands, ES, Ekvator, Korea, Kuba, New Zealand, Russland, Taiwan og Vanuatu.

### *10.5 NAMMCO*

NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commission) varð stovnað í 1992. NAMMCO er eitt samstarv um vernd, umsiting og gransking av havsúgdjórum í Norðuratlantshavinum.

Vísindanevndin (*Scientific Committee*) hjá NAMMCO veitir ráðnum og umsitingarnevndunum hjá NAMMCO vísindaliga ráðgeving um hvala- og kópastovnar. Harumframt hevur vísindanevndin síðan 1995 skipað fyri hvalateljingum við regluligum millumbili.

NAMMCO hevur harafturat m.a. eitt virkið samstarv millum veiðimenn og djóralæknaserfrøðingar um avlíving av hvalum og kópum (*Committee on Hunting Methods*). Gjøgnum hetta samstarv kunnu Føroyar áhaldandi meta um arbeiðið at bøta um avlíving av grindahvalum í Føroyum og kunna seg um royndir í øðrum londum.

Føroyar hava limaskap í egnum navni í NAMMCO. Hini limalondini eru Grønland, Ísland og Noreg. Harafturat luttaka Kanada, Japan, Danmark og Russland sum eygleiðarar.

## 11. Atlimaskapur í ST-felagsskapum

### *11.1 FAO*

Í 2007 gjørdust Føroyar atlimur í ST-felagsskapinum fyri matvørur og landbúnað, FAO (Food and Agriculture Organization). Tað er serliga í fiskivinnusamstarvinum, at Føroyar eru virknar. Føroyar hava talu- og framløgurætt, men ikki atkvøðurætt.

Semja er tó um meginpartin av teimum avgerðum, sum FAO tekur.

Virksemiðí FAO er sera umfatandi, og Føroyar hava raðfest luttøkuna í fiskivinnusamstarvinum. Hetta samstarv gevur atgongd til nógva vitan um alheims fiskivinnu, beinleiðis sambond við fiskivinnutjóðir kring allan heim og møguleika at vera við til at menna felags meginreglur fyri burðardyggan fiskiskap, handil við fiskavørum og aling. Ein týðandi táttur í at menna føroysku luttøkuna í framtíðini verður at samskipa regluligar frágreiðingar um føroyska fiskivinnu til FAO. Føroyar vóru við í samráðingum hjá FAO um at gera altjóða sáttmála um havnatiltøk til at basa ólógligari fiskiveiðu, um leiðreglur um djúphavsfiskiskap og um hjáveiðu og útblaking.

### *11.2 IMO*

IMO er felagsskapur Sameindu Tjóða fyri sjóvinnu, og Føroyar hava síðan 2002 havt atlimaskap í hesum felagsskapi. Atlimaskapurin gevur rætt til at taka lut á øllum fundum, umframt rætt til at taka orðið og at senda inn skjøl til viðgerðar. Atlimaskapurin gevur ikki atkvøðurætt, men semja er tó um meginpartin av øllum avgerðum, sum IMO tekur.

Føroyar eru flaggstatur við altjóða skipaskrá, FAS. Vit skulu støðugt veita eina dygdargóða tænastu í sambandi við skipanina, og tað er týðandi fyri umdømið hjá FAS, at vit luttaka á IMO-fundum. Verður ikki møtt, verður tað viðmerkt av ICS (Flag State Performance Table).

Føroyar hava eisini tikið undir við flestu altjóða sáttmálum hjá IMO um eitt nú trygd á sjónum og um havdálking frá skipum. Føroyar hava tískil altjóða skyldu til at fylgja hesum reglum.

Harumframt verður nógv arbeiði gjørt í IMO við at fyribyrgja dálking og við at økja um trygdina á sjónum. Nú siglingin í Arktis væntandi fer at økjast, er uppskot um reglugerð fyri skipaferðslu í Arktis og Antarktis liðugt.

## 11.3 UNESCO

Í 2009 fingu Føroyar atlimaskap í ST-stovninum fyri vísindi, útbúgving og mentan, UNESCO (United Nations Educational, Scientific and Cultural Organization).

Samstarvið snýr seg yvirskipað um at virka fyri friði og samstarvi ímillum limalondini og til frama fyri menning innan starvsøkini útbúgving, vísind, mentan og samskifti. Føroyar hava møguleika at luttaka í øllum virksemi hjá UNESCO og hava talu- og framløgurætt, tó ikki atkvøðurætt á aðalfundum. UNESCO hevur høvðusskrivstovu í París og er skipað við aðalskrivara Irina Bokova og stýrisráði við umboðum úr 58 limalondum. Aðalfundurin, har øll limalond luttaka, er annaðhvørt ár.

Norðurlond hava tætt samstarv í UNESCO og Føroyar eru við í virkna samstarvinum, ið Norðurlond hava. Norðurlond royna at virka fyri, at londini altíð hava eitt umboð í stýrisráðnum. Árini 2009-2013 var Danmark umboðað, og síðan 2013 og fram til 2017 er tað Svøríki, sum er umboðað í stýrisráðnum.

Eitt av kendastu átøkum hjá UNESCO er heimsarvslistin. Á listanum eru dømi um mentanar- og náttúruarv, ið verður mettur at vera so serstakur, at serlig átøk skulu gerast fyri at varðveita hann. Sum liður í tilgongdini at fáa føroyskan mentanar- og náttúruarv á heimsarvslistan, skipaði tjóðarnevndin fyri almennum tiltaki um UNESCO-sáttmálar, heimsarv og føroyskan mentanar- og náttúruarv á Tjóðsavninum í november 2014.